gult24 cyan24 magenta24 svart24



# Fólk fara til bøkurnar, men sláa upp á teldu

**Ein av týðandi, men kanska heldur fjaldu stovnunum í Miðbýnum, er Býarbókasavnið. Virksemið er nógv, við vaksandi telduvirksemi. Hølini eru lítil og tað eru onnur enn havnarfólk, ið hava lánikort til Býarbókasavnið og bæði børn og vaksin nýta spøl, teldur og lesistovu dúgliga**



*Á Býarbókasavninum eru tey ikki í iva um, at bókasavnsvirksemið hevur eina framtíð, hóast teldur og annað*

MIÐBÝURIN
*Dagfinn Olsen*

Við gongugøtuna í Havn liggur Býarbókasavnið. Heili 14.340 fólk hava lánikort har og tað eru ikki bert havnarfólk.

Hóast heldur trongligt, so eru hølini hugnalig og í fjør vóru 79.000 vitjandi á Býarbókasavninum og 65.000 útlán vóru. Umframt tey vitjandi, so læna eisini fólk kring landið, tí gjørligt er at ringja og bíleggja sær tilfar.

Gomlu lánikortini eru søga, alt er á teldu nú. Bókasavnið kann bjóða internet, men vísast er at bíleggja pláss, tí nógv eru um boðið. Á Barnabókasavninum eru spæliteldur, ið eru nógv nýttar. Barnabókasavnið er eisini væl vitjað og serliga hugnaligt meta tey á bókasavninum tað vera, at dagpleygumammur vitja dúgliga við børnum.

## Ikki margmiðlar

Ikki er óvanligt aðrastaðni, at finna fløgur og sjónbond á bókasøvnum. Men hetta er ikki at finna á Býarbókasavninum. Orsøkin er einføld: plásstrot.

Á Býarbókasavninum verður sagt, at hetta áttu tey at havt at bjóða, men plássið er lítið, hóast tey fingu økt gólvvíddina í 1995.

Men nógv er til av ljóðbókum til teirra, ið hava brúk fyri hesum.

Lesistovan hevur mangt og ymiskt at bjóða. T.d. føroysk og útlendsk bløð og tíðarrit og lesistovan verður nógv nýtt.

## Broytingar

Teldutøknin hevur kollvelt so mong samfelagsøki og so er eisini á bókasøvnum. Á Býarbókasavninum ásanna tey, at uppgáva teirra er at lata kunnleika og upplýsing. Men hóast útsøgnir um bókadeyða og at teldan ger av við skriving og við bókina, so eru ikki tekin um hetta enn. Á bókasavninum siga tey, at hagtøl vísa, at fólk fara eftir bókini, men tá sláast skal upp, so er teldan hent og verður nýtt. Skúlaungdómurin nýtir bøkurnar nógv.

Teldan vinnur, tá sláast skal upp og er hent, tá t.d. leitast skal eftir útbúgvingum uttanlands og øðrum. Fólk duga væl við teldunum, staðfesta bókavørðarnir.

Eitt ber tó ikki til á Býarbókasavninum og tað er at chatta. Fólk nýta teldurnar til teldupost, men bókavørðarnir hava greitt - serliga ungfólki – frá, at chattið hevur ov nógv óljóð við sær og so við og við skilja fólk hetta.

## Ikki tíðarhóskandi hølisviðurskifti

Á Býarbókasavninum eru tey ikki í iva um, at bókasavnsvirksemið hevur eina framtíð, hóast teldur og annað, men hetta verður sagt í ásannan av, at hølini við gongugøtuna eru ikki tíðarhóskandi og lítið pláss er.

Trupult ella vónleyst er hjá brekaðum, illa gongdum og mammum við børnum at vitja Býarbókasavnið.

Bókasavnið hevur fleiri bøkur á goymslu, tí rúm er ikki fyri øllum. Eisini teldurnar taka sera nógv pláss.

Hvussu verður við hesum viðurskiftum er sjálvsagt ein politiskur spurningur, men staðfestast kann, at nógv vitjaðu og nýttu hølini í Miðbýnum er ikki tíðarhóskandi.

Ein lættur háttur at vitja Býarbókasavnið er at fara inn á heimasíðuna: www.byarbok.fo




gult25 cyan25 magenta25 svart25












